Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

1350 MILLIÓNIR KRÓNUR EFTIR HÆLI

LÝSING AV GRUNDRAKSTRI LANDSKASSANS ÁRINI 2000-2010

STARVSRIT
JONHARD ELIASEN
AUGUST 2010

INNIHALDSYVIRLIT

SAMANDRÁTTUR OG NIÐURSTØÐUR 4
ÚRSLIT AV GRUNDRAKSTRI 5
INNTØKUGONGD 6
ÚTREIÐSLUGONGD 8
GREINING AV LØNUM UMFRAMT VØRU- OG TÆNASTUKEYPI 10
GREINING AV VEITINGARÚTREIÐSLUM 12

Samandráttur og niðurstøður

Úrslitið av grundrakstri landskassans vísti fyri árið 2000 eitt yvirskot uppá 767 mió kr. Í fíggjarlógini fyri 2010 verður roknað við undirskoti uppá 581 mió kr. Grundrakstur landskassans er við hesum versnaður við út við 1.350 mió kr í tíðarskeiðinum 2000-2010.

Hugtakið *úrslit av grundrakstri* fevnir um vanligu útreiðslur og inntøkur landskassans - ikki um rentur, íløgur, einskiljingarinntøkur og aðrar kapitalinntøkur.

Úrslitið av grundrakstrinum er týdningarmikið mát, ið kann siga okkum nakað um, í hvønn mun rúm er í landskassanum til rentur og íløgur. Íleggjarar og ratingstovnar brúka úrslitið í metingum sínum av, um landskassin, sum frá líður, megnar at halda lánsskyldur sínar.

Skattatrýstið frá landskassanum er lítið broytt í 2010 í mun til 2000, hóast royndir hava verið gjørdar at lækka arbeiðsskattin. Á inntøkusíðuni er lækkingin av heildarveitingini sum politiskt átak størsta einstaka grundin til versnandi rakstrarúrslit. Men meðan 'blokkurin' er lækkaður góðar 350 mió kr eru aðrar rakstrarinntøkur landskassans øktar við umleið 1.000 mió kr. Høvuðsorsøkin til, at rakstrarúrslit landskassans er umleið 1.350 mió kr verri í ár 2010 enn tíggju ár frammanundan, er tí at finna á útreiðslusíðuni.

Løgting og landsstýri tykjast hava trupulleikar í sambandi við stýring av útreiðslum landskassans. Árini 2000 til 2010 eru bruttoútreiðslurnar øktar við meiri enn 2.000 mió kr. Prís-reinsaði vøksturin av útreiðslum til lønir, tilfar og veitingar hevur í miðal verið 3,4% árliga, sum er fleiri ferðir størri enn tilsvarandi vøksturin hjá danska ríkiskassanum.

Mælt verður til, at yvirlit yvir grundrakstur landskassans framyvir verður kunngjørt sum partur av uppskotum um fíggjarlógarkarm og fíggjarlóg.

Úrslit av grundrakstri

Mynd 1 vísir gongdina í úrslitinum av grundrakstri landskassans árini 2000-2010[1]. Árini 2000 og 2001 var talan um yvirskot uppá ávikavist 767 mió kr og 894 mió kr. Eftir hetta gongur afturá árini fram til 2009, tá ið yvirskotið er vent til hall uppá 450 mió kr og mett hall - sambært fíggjarlógini - uppá 581 mió kr í 2010. Í tíðarskeiðinum er við øðrum orðum eitt yvirskot uppá 767 mió kr vent til eitt hall uppá 581 mió kr; ein afturgongd í rakstrarúrslitinum uppá umleið 1.350 mió kr.

Úrslit av grundrakstri landskassans árini 2000-2010 í mió kr **Mynd 1**



Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Tykist sum gongdin við versnandi úrsliti hevur verið rættuliga støðug seinasta áratíggju. Undantak eru árini 2006 og 2007, tá ið niðurgongd vendist til uppgongd. Hóast útreiðslurnar øktust í stórum hesi árini, tók stórt yvirskot seg upp, tí inntøkurnar vuksu uppaftur meira enn útreiðslurnar. Inntøkuvøksturin hekk nógv saman við óvanliga stóra kreditt-vøkstrinum hjá føroysku peningastovnunum uppá ávikavist umleið 2.500 og 5.000 mió kr[2] árini 2006 og 2007.

Neyðugt er, at vend kemur í gongdina. Uttan yvirskot á rakstrarpostum landskassans verður sum frá líður trupult at rinda rentur av vaksandi skuld. Uppaftur verri verður at finna pening til íløgur.

Niðanfyri verður roynt at lýsa broytingarnar, sum eru farnar fram við støði í roknskapar- og fíggjarlógartølum fyri árini 2000-2010. Lítið verður gjørt við at greiða frá orsøkum til úrslitini, sum verða víst. Treyðugt so, onkur viðmerkingin fellur tó um atferðarmynstur innan politisku skipanina og fylgjur, sum standast av hesum.

Av tí at hendan greining fyrst og fremst snýr seg um at lýsa broyttu javnvágina millum rakstrarinntøkur og –útreiðslur, verður lítið gjørt við at lýsa gongdina í føstum prísum.

Á mynd 2 sæst gongdin í rakstrarinntøkum og -útreiðslum brutto hjá landskassanum árini 2000-2010. Myndin vísir, at mettu inntøkurnar fyri 2010 verða 661 mió kr størri enn í 2000, meðan útreiðslurnar eru øktar við 2.009 mió kr í tíðarskeiðinum.

---

[1] Talgrundarlagið, sum verður brúkt í hesum riti, stavar frá dátugrunni, sum er skipaður í samstarvi millum Gjaldstovuna, Hagstovuna og Landsbankan. Dátugrunnurin ber heitið "BRAG-dátugrunnurin", sum er stytting fyri 'dátugrunnur viðvíkandi ***b**úsketti og **r**oknskapum fyri **a**lmenna **g**eiran'*. BRAG er grundaður á serlig úttøk úr roknskaparskipanini hjá Gjaldstovuni. Samankoyring er gjørd av hesum dátum við dátur hjá Hagstovuni, sum snúgva seg um flokkingar av landskassastovnum eftir COFOG-skipanini og tjóðarroknskapargeirum sambært SNA93-leiðreglum. Skipanin/dátugrunnurin er nærri lýstur í starvsritinum: "Greiningaramboð viðvíkjandi landskassanum", Jonhard Eliasen, Landsbankin, august 2010.

[2] Kelda: Starvsrit við heitinum "Fíggjarpolitikkur og búskaparsveiggj", frá februar 2010, tøkt á slóðini www.landsbankin.fo

Rakstrarinntøkur og -útreiðslur landskassans brutto árini 2000-2010 í mió kr **Mynd 2**



Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Inntøkugongd

Talva 1 niðanfyri vísir gongdina viðvíkjandi bruttorakstrarinntøkum landskassans árini 2000-2010. Í fyrsta umfari síggja vit burtur frá teimum báðum niðastu postunum í talvuni, tvs. flytingum frá kommunum v.m. og sølu av vørum og tænastum hjá stovnum á fíggjarlógini. Rættast er at greina hesar postar saman við nær slektaðar postar á útreiðslusíðuni, og verður vent aftur til hetta niðanfyri.

Rakstrarinntøkur landskassans (brutto) **Talva 1**

Mió kr	00	´01	´02	´03	´04	´05	´06	´07	´08	´09	´10 FL	Broyting '00-'10
1. Beinleiðis skattir	1.304	1.561	1.669	1.577	1.534	1.503	1.675	1.785	1.826	1.750	1.820	516
2. Óbeinleiðis skattir	1.268	1.321	1.434	1.488	1.487	1.544	1.807	2.014	1.934	1.726	1.742	474
3. Gjøld og bøtur	42	47	44	45	53	49	57	60	73	77	74	32
4. Heildarveiting v.m.	1.005	1.023	670	659	673	661	658	668	673	663	656	-349
5. Frá kommunum v.m.	201	159	149	152	131	132	123	145	164	143	115	-86
6. Søla, vørur og tænastur	592	614	671	658	674	609	637	683	689	711	666	73
Rakstrarinntøkur tilsamans	4.411	4.726	4.638	4.578	4.552	4.498	4.957	5.356	5.359	5.068	5.072	661

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Vit síggja í talvu 1, at skatta- og avgjaldsinntøkur landskassans úr føroyskum keldum, tvs. postarnir 1+2+3 í talvuni, eru góðar 1.000 mió kr størri í 2010 enn í 2000. Løgtingið hevur í fleiri umførum broytt skattingina av arbeiðsinntøkum, meðan munandi takstbroytingar viðvíkjandi MVG, tolli og øðrum gjøldum ikki hava verið fyri.

Inntøkan úr Danmark (postur 4 í talvu 1) er tó í dag 349 mió kr minni enn í ár 2000. Broytingin stavar fyrst og fremst frá lækking av heildarveitingini, sum varð framd í 2001-02. Umframt lækkingina, varð prísjavningin av veitingini árini eftir 2001 burturbeind. Undir sama posti finnast endurgjøld frá danska statskassanum til landskassan viðvíkjandi eftirlønum innan yvirtikin málsøki, sum eru hækkaði í nevnda tíðarskeiði.

Vit kunnu lýsa broytingar í arbeiðsskatti við at rokna A- og B-skatt (í landskassaroknskapinum nevndur "vanligur landsskattur") og gjald til barsilsskipanina sum lutfall av samlaðum A- og B-inntøkum. Við hesum fáa vit eitt mát, ið sigur nakað um miðalskattatrýstið á arbeiðsinntøkur, sum landskassin stendur fyri. Vit síggja í hesum sambandi í talvu 2, at landskassin í ár 2000 tók 18,32% av A- og B-inntøkum í sín lut. Hesin partur hækkaði fram til ár 2002 upp í 20,3% fyri síðani at lækka niður í 16,08% í 2008 og 17,63% í 2009.

Í mun til ár 2000 er miðalskatturin til landskassan av arbeiði í 2009 lækkaður 0,7%-stig. Sosialir grunnar verða roknaðir sum partur av almenna geiranum. Teir týdningarmestu eru ALS,

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin (AMEG), Barsilsskipanin og Sjúkrakassin, sum nú er umskipaður til stovnin Heilsutrygd. Barsilsskipanin og Heilsutrygd eru við í fíggjarlógini. Roknskapirnir hjá ALS og AMEG, hinvegin, eru ikki við í roknskapi landskassans.

Verður her eisini hugsað um gjøld til ALS og AMEG, er lítið sum bendir á, at miðalskatturin á arbeiði í 2009 og 2010 er lægri enn í 2000. Heldur øvugt, tí nevndu gjøld samanlagt eru hækkaði frá 4,5% av A-inntøkum í ár 2000 til 5,5% í ár 2009[3].

Føroyska skattaskipanin er soleiðis háttað, at miðalskattatrýstið á A- og B-inntøkur økist uttan politisk inntriv, so hvørt inntøkurnar økjast nominelt. Hetta er fylgja av progressiónini í landsskattastiganum. Lønarvøkstur hevur við sær, at fleiri løntakarar verða fluttir í inntøkubólkar, sum verða harðari skattaðir enn áður. Størri lønarvøkstur talan er um - eisini um talan er um lítlan ella negativan vøkstur eftir, at hædd er tikin fyri inflatión - tess skjótari økist skattatrýstið.

Henda mekanisman hevur - saman við skattum uttanfyri landskassan - mótvirkað royndunum síðani ár 2000 at lækka arbeiðsskattin.

Talva 2 gevur okkum ábendingar um, at um løgting og landsstýri í 2009 høvdu skattað A- og B-inntøkur eins og í 2000, hevði skatturin í 2009 av arbeiðsinntøkum verið umleið 60 mió kr hægri enn roknskapurin vísti.

Skattatrýst landskassans á arbeiðsinntøkur (A- og B-inntøkur) v.m. **Talva 2**

upphæddir í mió kr	00	´01	´02	´03	´04	´05	´06	´07	´08	´09
A-inntøka	5.607	6.386	6.714	6.773	6.909	7.163	7.524	8.098	8.324	7.920
B-inntøka	344	443	396	368	358	343	472	470	473	431
A- og B-inntøkur	5.951	6.829	7.111	7.142	7.267	7.505	7.995	8.568	8.797	8.351
Vanligur landsskattur	1.090	1.284	1.415	1.359	1.321	1.321	1.380	1.421	1.327	1.387
Gjald til barsilsskipan	0	16	29	29	30	30	80	86	87	85
Landsskattur + barsilsskipan	1.090	1.300	1.444	1.388	1.351	1.351	1.461	1.507	1.414	1.472
Landskattur og barsilsskipan í % av A- og B-inntøkum	18,32	19,04	20,31	19,43	18,58	18,01	18,27	17,59	16,08	17,63
AMEG og ALS-gjøld í % av A- og/ella B-inntøkum	4,50	4,00	3,50	2,17	3,00	3,50	4,00	5,00	5,50	5,50

Keldur: Tøl viðv. A- og B-inntøkum fyri árini 2000-08 eru úr dátugrunninum á www.hagstovan.fo. Fyri 2009 er talan um fyribilstøl frá TAKS pr. 2/8-2010 . Tøl viðv. landsskatti stava frá leiðslukunningarskipanini hjá Gjaldstovuni (§20; Høvuðskonto 52101 *Vanligur landskattur* og høvuðskonta 52128 *Gjald til barsilsskipan*)

Viðm.: Gjøld til arbeiðsloysisskipanina og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, sum her verða lýst, fevna bæði um arbeiðstakara- og arbeiðsgevaragjøld.

Sum nevnt er rakstrarúrslit landskassans í tíðarskeiðinum 2000-2010 versnað við umleið 1.350 mió kr. Broytingar á inntøkusíðu landskassans, sum hava verið við til at gera rakstrarúrslitið verri, eru:

- Lækking í landsskatti, umleið 60 mió kr
- Lækking av ríkisveiting upp á 366 mió kr

Skattalætti og minking av ríkisveiting kunnu við hesum beinleiðis forklára 426 mió kr av teimum 1.350 mió kr, sum rakstrarúrslit landskassans er versnað. Verður prísjavning av 'blokkinum' eisini íroknað inntøkuminkingina, kunnu leysliga mett 150 mió kr leggjast afturat minkingini uppá 426 mió kr. Hinvegin eru, sum talva 1 vísir, skattainntøkur landskassans, hóast skattalætta, hækkaðar við umleið 1.000 mió kr síðan ár 2000.

[3] Hendan niðurstøðan er í samsvari við ritgerðina *Uppgerð av tí almenna,* Eyðun Jacobsen, Hagstova Føroya, juni 2010. Sí lýsingina av skattatrýsti á síðu 10. Greinin er tøk á heimasíðuni hjá Hagstovuni, undir "Útgávur > Ritgerðir".

Um gongdin viðvíkjandi arbeiðsskattastrýstinum, sum kommunurnar standa fyri, verður tikin við, er somuleiðis ikki stórt, ið bendir á, at arbeiðsskatturin er linkaður í tíðarskeiðnum 2000-2010. Hetta rit snýr seg um grundrakstur landskassans, og tí verður ikki í hesum umfari komið nærri inn á kommunal viðurskifti.

Útreiðslugongd

Talva 3 vísir útreiðslur landskassans árini 2000-2010. Fyri at fáa eina greiðari mynd av almennu nýtsluni, verða inntøkur frá sølu av vørum og tænastum tiknar við í hesa uppgerð. Peningastreymar millum land og kommunu eru somuleiðis lýstir við nettotølum.

Rakstrarútreiðslur landskassans (netto) **Talva 3**

Mió kr	00	´01	´02	´03	´04	´05	´06	´07	´08	´09	´10 FL	Broyting '00-'10
Løn v.m.	1.306	1.418	1.544	1.632	1.748	1.743	1.775	1.893	2.036	2.120	2.250	944
Keyp, vørur og tænastur	242	291	315	339	314	416	474	540	642	588	521	278
Veitingar	1.251	1.262	1.355	1.348	1.382	1.433	1.442	1.547	1.706	1.822	1.920	669
Flytingar til kommunur o.l.	-53	-56	-25	-23	-24	-20	-26	-48	-73	-54	-18	35
Samanlagt	2.746	2.915	3.190	3.296	3.421	3.571	3.665	3.932	4.311	4.475	4.672	1.926

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Talvan vísir, at landskassin í 2010 ætlast at rinda lønir, sum eru 944 mió kr størri enn lønirnar í ár 2000. Nettoútreiðslur til vørur og tænastur eru í sama tíðarskeiði øktar við 278 mió kr. Veitingar til einstaklingar, fyritøkur v.m. eru øktar við 669 mió kr.

Talva 4 vísir okkum útreiðsluvøksturin yvir tíðarskeiðið í prosentum. Talvan gevur okkum ábendingar um, at skiftandi landsstýrissamgongur hava havt ilt við at avmarka útreiðsluvøksturin. Reali útreiðsluvøksturin, tvs., vøkstur aftaná at hædd er tikin fyri príshækkinum) var í miðal 3,4%. Vøksturin á lønum og tilfari var í miðal 4,1%, her av 3,7% vøkstur í lønum og 6,8% vøkstur í vøru- og tænastukeypi netto.

Til sammetingar kann nevnast, at nýtslan hjá danska ríkiskassanum í føstum prísum í miðal vaks 0,5% árliga, árini 2002-2008[4]. Hjá almenna geiranum sum heild var talan um real-vøkstur svarandi til 1,5% í miðal sama tíðarskeið. Útreiðslur til lønir og tilfar hjá landskassanum vuksu við hesum í føstum prísum fleiri ferðir so skjótt, sum tær hjá ríkiskassanum og almenna geiranum í Danmark sum heild.

Rakstrarútreiðslur landskassans (netto), vøkstur í % **Talva 4**

	´01	´02	´03	´04	´05	´06	´07	´08	´09	´10 FL	Vøkstur í % árini '00-'10	Vøkstur í % í miðal pr ár	Realvøkstur í % í miðal pr ár
Løn v.m.	9	9	6	7	0	2	7	8	4	6	72	5,6	3,7
Vørur og tænastur	20	8	8	-7	32	14	14	19	-9	-11	115	8,8	6,8
Løn og tilfar	10	9	6	5	5	4	8	10	1	2	79	6,0	4,1
Veitingar	1	7	-1	3	4	1	7	10	7	5	54	4,4	2,5
Samanlagt	6	8	3	4	4	3	8	10	3	4	68	5,3	3,4

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Stimbrandi búskaparpolitikkur undan vali, sum veljarin veit um, hevur í mong ár fingið búskaparfrøðingar at hugsa, at samanhangur er millum búskaparpolitikk og valstríð. Empiriskt hevur ikki verið trupult at víst á, at útreiðslur - serliga útreiðslur, sum veljarin lættliga kann fáa eyga á – mangan økjast munandi upp undir val. Verri hevur gingist við at greiða frá, um og hví veljarin letur seg tøla av slíkum politikki.[5]

Talva 4 gevur ábendingar um, at útreiðslufyribrigdi eisini ger seg galdandi í Føroyum. Útreiðslur økjast munandi í sambandi við fíggjarlógirnar fyri 2001 og 2002 – valdagurin var 30 apríl 2002 – og fíggjarlógina fyri 2007, sum var tann seinasta undan valið tann 19. januar 2008.

Metstóri útreiðsluvøksturin í 2008 má í hesum høpi sigast at vera eitt løgið fyribrigdi, tí her var talan um fyrstu fíggjarlógina hjá nýggjari samgongu. Vanliga royna nýggjar stjórnir at tátta í tíðliga

---

[4] Kelda: Finansministeriet, http://www.fm.dk/Publikationer/2009/1760-Budgetoversigt%201%20Maj%202009/3%20Offentlige%20finanser%20og%20finanspolitikken.aspx

[5] Dømi um royndir at lýsa hesi viðurskifti eru:

- *Competence Matters, But How? Economic Disinformation and Political Budget Cycles*; Frank Bohn, Radboud University Nijmegen; NiCE Working Paper 09-112; November 2009, og
- Equilibrium Political Budget Cycles; Kenneth Rogoff, The American Economic Review, March 1990.

í valskeiðinum, fyri síðani at slaka uppundir val[6]. Uppaftur verri er at skilja stóra útreiðsluvøksturin, tá ið havt verður í huga, at fíggjarlógin fyri 2008 ikki varð samtykt fyrr enn árið var hálvliðið.

Landsstýrið, sum kom til aftaná úrtíðarvalið tann 20. januar í 2004 setti sær fyri at tátta í - millum annað innan miðfyrisitingina. Ætlanin varð framd, men hvat lønum viðvíkur, sást ikki virknaður fyrr enn í 2005. Hinvegin eydnaðist landsstýrinum í 2004 at skerja vøru- og tænastukeypið við 7% í mun til árið fyri. Men sum talva 4 vísir, eydnaðist ikki at halda kósina í hesum viðfangi, tí árið eftir – tvs. í 2005 - vaks nettokeypið av vørum og tænastum við heilum 32%. Stóri vøksturin helt fram fylgjandi árini.

Torført er at skilja útreiðslugongdina, tá ið havt verður í huga, at mangir politikkarar hava víst á, at skerjingin av blokk-stuðlinum var ein hóttan móti landskassarakstrinum. Logisk fylgja eftir blokk-niðurskurðin skuldi tískil verið, at royndir vórðu gjørdar í sambandi við fíggjarlóg - bæði av flokkum, sum ynskja og teimum, sum ikki ynskja blokkstuðul - at laga inntøkur og útreiðslur landskassans til nýggja veruleikan við skerdari veiting. Ilt er tó at fáa eyga á tiltøk, sum hava munað.

Orsøk til útreiðsluvøksturin í seinnu hálvu av tíðarskeiðnum 2000-2009 kann hava verið stóru einskiljingarinntøkurnar árini 2006 og 2007. Kann eisini vera, at stóri vøksturin í skatta- og avgjaldsinntøkum landskassans, sum stavaði frá stóra útlánsvøkstrinum hjá peningastovnunum, gav politisku skipanini eina falska mynd av, hvønn vegin úrslitið av grundrakstri landskassans gekk.

Í politisku viðgerðini av fíggjarlógini hevur serliga verið gáað eftir rakstrar-, løgu- og útlánsúrslitinum (RLÚ-úrslitinum). Her er talan um týdningarmikið mát fyri samlaðu fíggjarlógina, men áttu onnur mát eisini í størri mun at verðið brúkt. Hugskot kundi í hesum viðfangi verið, at Fíggjarmálaráðið í høvuðsyvirlitum í fíggjarlógaruppskotinum eisini lýsti gongdina viðvíkjandi grundrakstrinum.

Samanumtikið er mangt, sum bendir á, at skiftandi samgongur seinastu 10 árini hava havt stórar og grundleggjandi trupulleikar viðvíkjandi útreiðslustýringini. Í fyrsta lagi hevur ætlaði útreiðsluvøksturin – soleiðis sum hesin er komin til sjóndar í upprunaligu fíggjarlógunum fyri einstøku árini – verið stórur. Afturat hesum kemur, eins og talva 5 vísir, ein eykavøkstur í árunum 2003 og fram í sambandi við, at staðfestu útreiðslurnar gerast uppaftur størri enn ætlaðu útreiðslurnar í fíggjarlógini.

Í 2007 og 2008 gerst munurin millum tølini á upprunaligu fíggjarlógini og roknskapinum stórur. Talva 5 vísir í hesum sambandi til dømis, at landsstýrið í fíggjarlógini fyri 2008 ætlaði at økja veitingarútreiðslur við 145 mió kr í mun til upprunaligu fíggjarlógina fyri árið fyri.

Upprunalig fíggjarlóg og roknskapur viðvíkjandi lønum, keyp og sølu av vørum og tænastum **Talva 5**

mió kr	´00	´01	´02	´03	´04	´05	´06	´07	´08	´09
Roknskapur										
1 Løn v.m.	1.306	1.418	1.544	1.632	1.748	1.743	1.775	1.893	2.036	2.120
2 Keyp av vørum og tænastum netto	242	291	315	339	314	416	474	540	642	588
3 Veitingar	1.251	1.262	1.355	1.348	1.382	1.433	1.442	1.547	1.706	1.822
Upprunalig fíggjarlóg										
1 Løn v.m.	1.315	1.444	1.574	1.648	1.779	1.767	1.814	1.910	2.117	2.171
2 Keyp av vørum og tænastum netto	249	292	312	274	268	338	399	475	509	526
3 Veitingar	1.217	1.273	1.372	1.323	1.362	1.400	1.401	1.430	1.575	1.748
Meirnýtsla í mun til upprunaliga fíggjarlóg										
1 Løn v.m.	-9	-26	-30	-16	-31	-24	-39	-17	-81	-51
2 Keyp av vørum og tænastum netto	-7	-1	3	66	47	78	75	64	133	62
3 Veitingar	33	-11	-16	24	20	33	41	117	130	74
Meirnýtsla í mun til fíggjarlóg í alt	18	-38	-43	74	36	87	77	165	182	85

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Tá ið avtornaði gjørdust veitingarútreiðslurnar í 2008 275 mió kr størri enn ætlað í upprunaligu fíggjarlógini fyri 2007. Av hesum útreiðsluvøkstrinum vóru 185 mió kr bókaðar á standardkonto 52,

[6] Verður leitað longur aftur í tíð, eru dømi um størri útreiðsluvøkstur at finna. Útreiðsluvøksturin, valárið 1984 var t.d. umleið 20% í mun til árið fyri. Valárið 1988 vuksu staðfestu útreiðslurnar við umleið 40% í mun til 1987, harav leysliga mett ein fjórðingur stavaði frá meira og minni óvæntaðum útreiðslum í sambandi við landskassaveðhald. Nærri lýsing hesum viðvíkjandi er at finna í starvsriti við heitinum "Fíggjarpolitikkur og búskaparsveiggj", Landsbankin, februar 2010, tøkt á slóðini www.landsbankin.fo.

Tilskot til einstaklingar. Talva 6 vísir í hesum sambandi stovnar, sum í roknskapinum fyri 2008 stóðu fyri útreiðsluvøkstri upp á 5 mió kr ella meira í mun til fíggjarlógina fyri 2007.

Staðfestar útreiðslur í einum ári verða her sammettar við upprunaliga fíggjarlóg undanfarið ár, tí tá ið politisk viðgerð fer fram í einum ári av útreiðslunum fyri komandi ár, er tað nærum altíð við støði í seinast samtyktu fíggjarlóg.

Tilskot til einstaklingar: Stovnar við stórum útreiðsluvøkstri **Talva 6**

mió kr	Upprunalig fíggjar-lóg fyri 2007	Roknskapur 2008	Vøkstur
Stuðul til rentuútreiðslur (129501)	100	167	67
Vanlig forsorg, endurbúgving § 18 (124605)	25	40	16
Vanlig forsorg, hjálparamboð v.m. § 18 (124606)	41	51	10
Fólkapensjón (124801)	383	393	10
Læraraeftirlønir (116101)	34	44	9
Vanlig forsorg, meirútreiðslur, brekað barn § 17 (124604	19	28	9
Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði (15208	0	9	9
Dagpeningaskipanin, løntakarar (123601)	52	60	8
Hægsta fyritíðarpensjón (132542)	90	98	8
Lægsta fyritíðarpensjón (138040)	33	41	8
Barsilsskipan (135575)	75	83	8
Barnavernd (147014)	2	8	6
Stuðul til flutning og dupult húsarhald (129601)	13	18	5
Miðal fyritíðarpensjón (134064)	90	95	5
Samanlagt	956	1.136	180

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Greining av lønum umframt vøru- og tænastukeypi

Hagstovan flokkar í tjóðarroknskapinum stovnar undir landskassanum í ymsar geirar. Av týdningi fyri hesa greining av almenna rakstrinum eru geirarnir "Heimastýrisfyrisitingin" og "Vinnufeløg"[7].

Landskassin: Løn umframt keyp og søla av vørum og tænastum **Talva 7**

	´00	´01	´02	´03	´04	´05	´06	´07	´08	´09	´10 FL	Broyting '00-´10
Heimastýrisfyrisiting samanlagt	1.424	1.564	1.709	1.823	1.922	2.012	2.081	2.269	2.469	2.538	2.570	1.147
Løn v.m.	1.073	1.169	1.277	1.366	1.478	1.548	1.588	1.697	1.831	1.924	2.039	967
Vørur og tænastur netto	351	395	432	458	444	464	493	571	637	614	531	180
herav søla	-75	-80	-86	-82	-90	-95	-117	-128	-128	-122	-124	
herav keyp	426	475	519	540	534	559	609	699	765	736	655	
Vinnufeløg samanlagt	124	140	147	145	137	143	165	162	207	167	187	64
Løn v.m.	233	247	266	265	269	194	185	195	204	195	204	-29
Vørur og tænastur netto	-109	-107	-119	-120	-132	-50	-21	-33	3	-28	-16	93
herav søla	-497	-514	-564	-549	-558	-484	-489	-523	-524	-513	-512	
herav keyp	388	407	445	429	426	434	468	490	527	485	496	
Samanlagt	1.547	1.704	1.856	1.969	2.060	2.155	2.246	2.430	2.676	2.705	2.758	1.210

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Talva 7 vísir gongdina viðvíkjandi lønum umframt keypi og sølu av vørum og tænastum. Talvan vísir eisini, at lutfallið millum virksemi, sum vanliga verður roknað at hoyra almenna geiranum til, og vinnuligt virksemi broytist í tíðarskeiðinum 2000-2010. Í ár 2000 svaraðu t.d. lønir, sum høvdu við vinnuligt virksemi at gera, til á leið 20% av lønunum, sum landskassin hetta árið rindaði. Í 2010 var sami parturin fallin til 10%

Talva 8 vísir kostnaðin av vøru- og tænastuframleiðslu, sum í tjóðarroknskaparhøpi verða roknað at hoyra almenna geiranum til, greinaðan eftir endamáli sambært COFOG-skipanini[8]. Talvan gevur

[7] Ein triði bólkur av almennum stovnum, sum eru við í fíggjarlógini, er í tjóðarroknskaparhøpi almenni undirgeirin "sosialir grunnar". Hesin gerst alsamt størri í vavi. Í fíggjarlógini fyri 2010 eru veitingarstreymar hjá hesum eindum øktir frá umleið 100 mió kr til umleið 200 mió kr í sambandi við umskipanina av sjúkrakassum, sum áður høvdu roknskap uttanfyri landskassan, til stovnin "Heilsutrygd". Hesin undirgeirin verður ikki lýstur her, tí hann ikki munar stórt í sambandi við vøru- og tænastuframleiðslu.

ábendingar um, at kostnaðurin av ikki-vinnuligari framleiðslu hjá stovnum á fíggjarlógini er øktur munandi innan øll øki, undantikið innan minnu økini *Umhvørvisvernd*, *íbúð og umhvørvi* og *Mentamál*. Viðvíkjandi síðstnevndu málsøkjum er at siga, at framleiðsla innan hesi øki eisini liggur hjá eindum uttan fyri landskassan, t.d. hjá ymsum felagsskapum og kommunum. Útreiðslur hjá landskassanum til hesi øki koma tí partvíst eisini til sjóndar sum veitingar/studningar, sum lýstir eru i talvu 10.

Úrslit viðv. lønum umframt keypi og sølu av vørum og tænastum greinaði eftir COFOG-øki **Talva 8**

mió kr	´00	´02	´04	´06	´08	´10 FL	Broyting '00-´10 í mió kr	Broyting '00-´10 í %	Býti millum málsøki í ár '00 í %	Býti millum málsøki í ár '10 í %
01 Aðalfyrisiting	158	178	192	184	282	264	106	67	11	10
03 Rættarmál	1	11	17	30	12	24	23	1.563	0	1
04 Vinnumál	145	197	195	212	235	212	67	46	10	8
05 Umhvørvisvernd	0	0	2	1	6	7	7	3.483	0	0
06 Íbúð og umhvørvi	0	0	0	0	0	0	0	--	0	0
07 Heilsumál	433	501	569	619	739	763	329	76	30	30
08 Mentamál	33	37	37	32	33	35	2	8	2	1
09 Undirvísingarmál	398	471	517	555	634	690	293	74	28	27
10 Almannamál	256	313	393	448	528	575	319	125	18	22
Samanlagt	1.424	1.709	1.922	2.081	2.469	2.570	1.147	81	100	100

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Samanumtikið vísir talva 8 okkum, at av teimum 1.350 mió kr, sum úrslitið av grundrakstri landskassans er farið eftir hæli árini 2000-2010, stava út við 1.150 mió kr frá vaksandi útreiðslum til lønir og netto-tilfarskeyp í sambandi við ikki-vinnuliga framleiðslu.

Landskassastovnar, ið reka vinnuligt virksemi (SNA-geiri S1111) **Talva 9**

mió kr	´00	´01	´02	´03	´04	´05	´06	´07	´08	´09	´10 FL	Broyting '00-´10
04 Vinnumál												
Landsverk (138182 og 107520)	-54	-54	-57	-55	-58	-51	-49	-38	-28	-35	-49	5
Inntøkur	54	39	60	46	48	88	96	109	107	82	65	
Útreiðslur	-108	-92	-116	-101	-106	-139	-146	-147	-136	-117	-114	
Strandfaraskip Landsins (108020)	-59	-64	-74	-77	-78	-80	-108	-115	-144	-117	-137	-78
Inntøkur	89	100	101	90	91	94	71	59	57	55	57	
Útreiðslur	-148	-164	-175	-167	-169	-174	-179	-174	-201	-172	-195	
Postverk Føroya (108620)	-8	-4	-7	-3	1	0	0	0	0	0	0	8
Inntøkur	89	97	109	115	126	0	0	0	0	0	0	
Útreiðslur	-98	-101	-117	-118	-125	0	0	0	0	0	0	
Rúsdrekkasøla landsins (139115)	13	12	13	11	12	11	11	10	11	11	17	3
Inntøkur	99	103	105	102	101	99	104	115	117	118	122	
Útreiðslur	-86	-90	-91	-91	-89	-88	-93	-104	-106	-107	-105	
07 Heilsumál												
Apoteksverkið (137619)	-1	0	-1	-3	3	-1	0	-1	-2	-4	0	0
Inntøkur	120	130	142	143	137	149	162	169	189	201	212	
Útreiðslur	-121	-131	-144	-146	-134	-150	-162	-171	-190	-205	-212	
08 Mentamál												
Kringvarpið (148070,106020,106220)	-8	-10	-11	-9	-8	-9	-9	-7	-18	-10	-8	0
Inntøkur	44	45	46	52	54	54	53	54	53	52	56	
Útreiðslur	-51	-55	-57	-61	-62	-63	-62	-61	-71	-61	-64	
99 Ógreinað												
Ymsir stovnar, umsetningur < 10 mkr	-8	-20	-9	-9	-9	-12	-10	-12	-27	-12	-10	-2
Inntøkur	0	1	1	1	1	0	1	17	1	6	0	
Útreiðslur	-8	-20	-11	-10	-10	-13	-11	-28	-27	-18	-10	
Samanlagt	-124	-140	-147	-145	-137	-143	-165	-162	-207	-167	-187	-64

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Talva 9 vísir, at landskassastovnar, sum í tjóðarroknskapinum hoyra til vinnuliga geiran, í 2000 høvdu hall uppá 124 mió kr. Í 2010 verður roknað við, at undirskotið er økt til 187 mió kr, harav Strandfaraskip Landsins stendur fyri afturgongd uppá 78 mió kr.

[8] Her verður endamálið allýst eftir COFOG-skipanini á 2-siffraðum støði. COFOG-flokkingin, sum Hagstovan stendur fyri, tekur støði í stovnshugtakinum í landskassaroknskapinum.
Meira um COFOG á heimasíðuni hjá hagtalsstovninum hjá Sameindu Tjóðum á slóðini: http://unstats.un.org/unsd/cr/registry/regcst.asp?Cl=4&Top=1&Lg=1

Greining av veitingarútreiðslum

Veitingar frá stovnum, sum eru við í fíggjarlógini, eru lýstar í talvu 10. Útreiðslurnar eru her flokkaðar eftir almennum undirgeira og standardkonto.

Landskassin: Veitingarútreiðslur **Talva 10**

mió kr	´00	´01	´02	´03	´04	´05	´06	´07	´08	´09	´10 FL	Broyting '00-´10
Heimastýrisfyrisiting												
51 Tilskot til útlandið o.a.	22	22	28	26	21	29	27	28	26	25	30	8
52 Tilskot til einstaklingar	955	963	1.014	1.028	1.065	1.093	1.091	1.149	1.306	1.392	1.432	477
53 Stuðul til vinnu	170	132	125	122	102	134	140	164	147	151	153	-17
54 Stuðul til annað virksemi	95	101	113	86	90	93	97	124	129	147	90	-5
55 Íløgustuðul o.a.	3	7	4	5	5	6	4	3	1	1	1	-2
Sosialir grunnar við í landskassaroknskapi												
52 Tilskot til einstaklingar	0	30	66	78	77	66	70	66	83	91	198	198
Samanlagt	1.244	1.255	1.348	1.346	1.361	1.421	1.429	1.534	1.691	1.807	1.904	660

Kelda: Gjaldstovan, Hagstovan og Landsbankin; BRAG-dátugrunnurin

Størsti parturin av veitingarútreiðslum fer til einstaklingar. Í ár 2000 fingu einstaklingar tilskot svarandi til 955 mió kr. Í 2010 verður roknað við, at hesar útreiðslur verða 1.630 mió kr, svarandi til ein vøkstur uppá 675 mió kr frá ár 2000 til 2010. Her skal tó havast í huga, at útreiðslur í 2010, - svarandi til umleið 100 mió kr - stava frá umskipan av gomlu sjúkrakassunum, sum høvdu sjálvstøðugan roknskap, til nýggja stovnin “Heilsutrygd”, sum er partur av landskassaroknskapinum. Heilsutrygd er saman við Barsilsskipanini flokkaður í almenna undirgeiran S1340 Sosialir grunnar.

Minkingin á standardkonto 54, *stuðul til vinnu*, frá 170 mio kr í ár 2000 til 132 mió í 2001 er heldur misvísandi, tí avskrivingar av veðhaldsútleggum og útlánum úr landskassanum vóru umleið 50 mió kr í 2000.